Olivia W. Hansen

Sálmar
- til fólkaskúlan



Miðdeild

Olivia W. Hansen

Sálmar til fólkaskúlan

- miðdeild



Føroya Skúlabókagrunnur 2008

Olivia W. Hansen
Sálmar til fólkaskúlan, miðdeild
©Føroya Skúlabókagrunnur 2008
Útgáva: Føroya Skúlabókagrunnur, Tórshavn 2008
ISBN 978-99918-0-961-8

Innihaldsyvirlit

Sálmabók Føroya kirkju 7

Skipanin av sálmunum 8
Tann ápostolska trúarjáttanin 8
Sálmaskaldini 9
Sálmarnir og kirkjuárið 10

Upprunin til kirkjuhátíðirnar 11

Sunnudagur 11
Føstan og páskirnar 11
Dymbildagavikan 11
Páskir 11
Hvítusunna 12
Advent og jól 12
Allahalgannadagur 13
Sálmarnir og tekstarøðin 14

Sálmagreining 15

1 Harra Guð, títt dýra navn og æra 16
Um sálmin 16

25 Upp alt, ið Harrin hevur gjørt 18
Um sálmin 18
Náttúran sum prógv fyri at Guð er til 18

29 Alt, sum frítt og fagurt er 20
Skapanin 20
Um sálmin 21

48 Lítla Guðs barn, hvat sakar teg? 22
Stúrið ikki 23

82 Ver vælkomið, Harrans ár 24
Um sálmin 24

103 Tað sótu seyðamenn á vakt 25
Hirðarnir 25

105 Jól hava einglaljóð 27
Um sálmin 27

123 Dýrasti Jesus 29
Um sálmin 29

197 Sum vársól lýsir yvir fold 30
Um sálmin 30

216 Frøi er í himli høga! 31
Himmalferðin 31

231 Vit Halgan Anda biðja nú 33
Perlan 33
Um sálmin 33

242 Kirkjan hon er eitt gamalt hús 35
Um sálmin 35

255 Vár Guð er føst og haldgóð borg 37
Um sálmin 37

318 Um tú vilt gleði vinna 39
Um sálmin 39
327 Hin signaða dag vit síggja fró 41
Um sálmin 41
Ljósið 42
470 Kom, friður av himni, í hjørtuni inn 43
Um sálmin 43
Jesu dópur 44
522 Guð, ger meg til eitt lítið ljós 45
Um sálmin 45
545 Guð, tú sum ljósið lætst skína so bjart 46
Um sálmin 46

Sálmabók Føroya kirkju

Petur Martin Rasmussen sigur í kirkjusøgu síni, at føroysk sálmayrking er ein frukt av tjóðskaparrørsluni, og at teir føroysku sálmayrkjararnir eru fyri ein stóran part teir somu, sum teir, ið yrkt hava verðsligan skaldskap, eitt nú fosturlandssangir. Nevnast kunnu menn sum: Mikkjal á Ryggi, Jacob Dahl, Frederik Petersen, Símun av Skarði og Jóannes Patursson. Allir teir føroysku sálmayrkjararnir eru føddir eftir 1850.

Fyrsta føroyska sálmabókin, Sálmabók Føroya Fólks, kom út í 1961. Í henni vóru 431 sálmar, og við henni fekk kirkjan føroyska sálmabók. Frammanundan vóru danskar sálmabøkur nýttar. Men føroyingar høvdu tó føroyskar sálmar, áðrenn sálmabókin kom, tí ymisk feløg høvdu givið út hefti við sangum og sálmum. Áðrenn føroyskt gjørdist kirkjumál, lótu prestar prenta fleiri serhefti við sálmum, sum vórðu nýtt til føroyskar gudstænastur og onnur høvi.

Í 1920 árunum fór Brøðrasamkoman undir at geva út hefti við sálmum og sangum, og teirra fyrsta høvuðssangbók, Songbók Guds fólks, kom fyrstu ferð út í 1932.
Í 1930 árunum gav Heimamissiónin sína fyrstu sangbók út, og í 1948 kom sangbókin hjá Kirkjuligum Missiónsfelagi út á fyrsta sinni. Síðani hetta hava nógvar nýggjari rørslur fingið prentað sanghefti og sangbøkur, sum tey nýta.

Onnur føroyska sálmabókin kom út í 1992. Í henni eru 592 sálmar. Har eru allir sálmarnar úr tí gomlu sálmabókini, tó er onkur teirra eitt sindur broyttur málsliga, onkur longdur ella styttur, og harafturat eru nógvir nýggir sálmar við.

Sálmabókin er eisini at finna á alnetinum á heimasíðuni hjá Føroya Stiftsstjórn www.folkakirkjan.fo .

Skipanin av innihaldinum í sálmabókini

Báðar sálmabøkurnar eru komnar út í tveimum útgávum, einari minni útgávu og einari størri. Tann størra útgávan hevur eitt ískoyti, har m.a. ritual, tekstir og bønir eru við. Hóast útgávurnar eru ymiskar, so sæst hetta ikki á innihaldsyvirlitinum fremst í sálmabókini, tí tað er tað sama í báðum útgávunum, men hin størra hevur eisini eitt innihaldsyvirlit yvir ískoytið, og tað stendur aftast í sálmabókini.

Skipanin av sálmunum

Sálmarnir í Sálmabókini eru skipaðir eftir ávísari raðfylgju, sum fylgir tí ápostólsku trúarjáttanini, tó byrjar Sálmabókin við lovsangum. Síðani koma sálmar um trúnna á Guð faðir, Guð son og Halga andan. Eftir hetta koma sálmar um kristnilívið, og har finna vit eisini sálmar til serstøk høvi, til árstíðirnar og morgun- og kvøldsálmar

Tað er lætt at finna sálmarnar í Sálmabókini, um tú kennir fyrstu regluna ella bara byrjanarorðini í sálminum. So kanst tú sláa sálmin upp í yvirlitinum, sum stendur aftast í Sálmabókini. Kennir tú innhaldið í sálminum, so veitst tú eisini, í hvørjum parti av sálmabókini sálmurin er at finna sambært trúarorðunum.

Tann ápostolska trúarjáttanin

Eg trúgvi á Guð faðir, hin alvalda, skapara himins og jarðar.

Eg trúgvi á Jesus Krist, Guðs einborna son, váran harra, sum er gitin av heilagum anda, borin í heim av Mariu moy, pínslaður undir Pontiusi Pilatusi, krossfestur, deyður og jarðaður, niðurfarin til heljar, triðja dagin staðin upp frá deyðum, farin til himmals, sitandi við høgru hond Guðs faðirs hins alvalda, haðani hann kemur at døma livandi og deyð.

Eg trúgvi á heilagan anda, eina heilaga almenna kirkju, samfelag teirra heilagu, fyrigeving syndanna, uppreisn likamsins og lív um aldur og ævir. Amen

Uppgávur:

1. Finn innihaldsyvirlitið fremst í Sálmabókini. Hvussu nógvar bólkar (sløg av sálmum) finnur tú har?

2. Slá upp á sálm nr. 26.

3. a) Hvussu eitur sálmurin?
   b) Hvat slag av sálmi er hetta? (Hygg ovast á síðuna)

4. Slá upp á sálm nr. 154.
   a) Hvussu eitur sálmurin?
   b) Hvat slag av sálmi er hetta?

5. Slá upp á sálm nr. 580.
   a) Hvussu eitur sálmurin?
   b) Hvat slag av sálmi er hetta?

6. Hvussu nógvar sálmar finnur tú undir innihaldsorðunum.
   a) Trúgvin á Guð Faðir?
   b) Trúgvin á Guð Son?
   c) Trúgvin á Guð Halgan Anda?
   b) Kristinlívið?

Sálmaskaldini

Undir hvørjum sálmi stendur skaldið nevnt, men við hvørt standa fleiri nøvn har, tí sálmurin kann vera umyrktur. Hetta síggja vit ofta við gomlum sálmum, sum eru umyrktir seinni. Við hvørt stendur árstalið, tá ið sálmurin er yrktur, og onkuntíð stendur eisini viðmerkt, um sálmurin er ein serligur sálmur, t.d. ein gamal sálmur, sum hevur kirkjusøguligan týdning. Eisini kann standa viðmerkt undir sálminum, um hann er yrktur yvir eitt ávíst stað í Bíbliuni.

Uppgávur:

1. Hvat fáa vit at vita um upprunan til hesar sálmarnar:
   a) nr. 16 *Tær, Guð, sum ein ræður himni á?*
   b) nr. 18 *Alvalds Guð, vit prísa tær*

2. Hvat stað í Bíbliuni hevur givið skaldunum íblástur til hesar sálmar:
   a) nr. 43 *Tín miskunn, o Guð?*
   b) nr. 44 *Lít allar tínar leiðir*?
   c) nr. 255 *Vár Guð er føst og haldgóð borg?*
   d) nr. 503 *Frelsarin hirði mín góður er?*

Er sálmurin týddur til føroyskt, stendur eisini navnið á týðaranum undir sálminum. Ein sálmur, sum er yrktur á føroyskum, nevna vit ein upprunasálm, meðan ein sálmur, sum hevur sín uppruna á einum fremmandum máli, nevna vit ein týddan ella ein umyrktan sálm. Tað kann vera trupult at gera greiðan skilnað millum eina týðing

og eina umyrking. Hevur rithøvundurin t.d. einans flutt sálmin í føroyskt mál og umhvørvi og annars ikki broytt innihaldið nakað, er talan um eina týðing, men hevur týðarin harafturímóti broytt nakað við sálminum ella lagt nakað aftur at boðskapinum, er talan um eina umyrking. Í yvirlitinum yvir sálmaskald aftast í Sálmabókini hava upprunasálmarnir frámerki **a,** meðan teir týddu ella umyrktu sálmarnir hava frámerki **b**.

Uppgávur:

1. Hvat fáa vit at vita um upprunan til hesar sálmarnar:
   a) nr. 95 *Gleðilig jól?*
   b) nr. 96 *Eitt barn er føtt Betlehem?*

2. Hvussu nógvar upprunasálmar, **a,** og týddar ella umyrktar sálmar, **b,** hava hesi sálmaskaldini í sálmabókini?
   a) Jacob Dahl
   b) Edmund í Garði
   c) Jóannes Patursson
   d) Mikkjal Dánjalsson á Ryggi
   e) Símun av Skarði

Undir hvørjum sálmi er uppgivið eitt ella fleiri løg, sum kunnu nýtast til sálmin. Aftast í stóru Sálmabókini er eitt yvirlit, og har sæst, hvar sálmaløgini eru at finna.

Sálmarnir og kirkjuárið

Sum áður sagt, so eru sálmarnir skipaðir eftir innihaldinum í trúarjáttanini: fyrst koma sálmarnir um Faðirin, Sonin og Andan, síðani koma sálmar, sum viðgera kristnilívið sum heild.

Í Sálmabókini finna vit eisini uppskot til sálmar teir ávísu sunnudagarnar í árinum. Kirkjuárið byrjar fyrsta sunnudag í advent (uml. 1.des.) og fylgir sostatt ikki álmanakkaárinum. Kirkjuárið er skipað eftir teimum stóru kristnu hátíðunum, men umleið helmingurin av kirkjuárinum hevur onga hátíð.

Upprunin til kirkjuhátíðirnar

Sunnudagur

Jødar halda sum kunnugt leygardagin heilagan. Tað gjørdi Jesus eisini, men av tí at hann reis av deyða sunnumorgun, gjørdu tey kristnu av, at halda sunnudagin heilagan. Broytingin at halda fyrsta dag í vikuni, sunnudag, heilagan í staðin fyri síðsta dag í vikuni, byrjar longu í frumkirkjuni.

Føstan og páskirnar

Sum frá leið, fingu báðar tær stóru hátíðirnar - jólini og páskirnar - eina fyrireikingartíð og eina tíð aftaná, sum varð roknað upp í hátíðina.

Dymbildagavikan

Navnið kemur av, at fyrr varð stórur dentur lagdur á, at alt skuldi vera so stilt í páskavikuni fyri at minnast Jesu líðing og deyða. Tí tók klokkarin málmkúlvin úr kirkjuklokkuni og setti ein trækúlv (ein dymbil) í staðin. Hetta gav eitt nógv veikari og stillari ljóð.

Fyrireikingartíðin fyri páskirnar er føstan, ið er 7 vikur (føstan skuldi vara í 40 dagar, sunnudagarnir vóru ikki roknaðir uppí). Vikan undan páskum kallast páskavikan ella dymbildagavikan. Vikan byrjar við pálmasunnudegi, og í hesi vikuni eru eisini skírhósdagur og langi fríggjadagur. Páskadagarnir eru tveir í tali. Páskirnar enda ikki fyrr enn Kristi himmalsferðardag, sum er 40 dagar eftir páskir.

Tann fyrsta kristna hátíðin, fólk fóru at halda, vóru páskir. Hvørki tær kristnu páskirnar ella tær hjá jødum eru ein dagstevndan dag. Tær kristnu páskirnar kunnu í fyrsta lagi vera 22. mars og í seinasta lagi 25. apríl.

Páskir

Tey kristnu tóku eisini við tí jødiska siðinum, har páskirnar vóru lagdar eftir mánanum. Jødarnir skipaðu árið eftir mánanum og ikki eftir sólini

Páskir eru fyrsta sunnudag eftir fyrsta fullmána eftir várjavndøgur (21. mars).

Sálmar til fólkaskúlan, miðdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

Uppgávur:

1. Finnið sálmarnar, sum hoyra til páskirnar
   a) Hvussu nógvir sálmar eru til føstuna og dymbildagavikuna?
   b) Hvussu nógvar av áðurnevndu sálmum kenna tit?

2. Blaða gjøgnum páskasálmarnar í sálmabókini. Hvørjar kenna tit?
   a) Veljið ein páskasálm í Sálmabókini, sum tit kenna.
   b) Syngið sálmin og samtalið um innihaldið.

Hvítusunna

Onnur hátíðin, tey kristnu fóru at halda, var hvítusunna, til minnis um tá ið Halgi andin varð sendur til jarðar.

Uppgávur:

1. Hvussu nógvar hvítusunnusálmar finna tit í Sálmabókini?
   a) Hvussu nógvir av hvítusunnusálmunum eru upprunasálmar?
   b) Hvørjar hvítusunnusálmar kenna tit?

Advent og jól

Fyrireikingartíðin fyri jól er adventin. Tað eru fýra sunnudagar í advent. Kirkjuárið byrjar fyrsta sunnudag í advent og ikki 1. januar sum álmanakkaárið. Jólini eru ikki liðug fyrr enn á trettanda (6. jan.), tá ið vit minnast vísmenninar úr Eysturlondum.

Norðbúgvar hildu eisini jól, áðrenn teir vóru kristnaðir. Teir blótaðu til gudarnar, mintust sínar forfedrar og hátíðarhildu, at sólin hækkaði á luftini.

Ikki fyrr enn í 4. øld fóru fólk at halda kristin jól til minnis um Jesu føðing. Í tí gamla Rómverjaríkinum hildu fólk eina ljósfest tann 25. desember, har keisarin var tilbiðin sum tann almáttuga sólin. Tá ið kristindómurin gjørdist statsátrúnaður í Rómverjaríkinum, bar illa til at halda eina heidna ljósfest. Hildið varð, at sjálvt um fólk vóru vorðin kristin, vildi hin heidni siðurin ikki hvørva við tað fyrsta Tí varð

avgjørt, at geva heidnu festini eitt annað innihald – eitt kristið innihald. Eingin veit við vissu at siga, nær á árinum Jesus varð føddur, men tá varð avgjørt at halda Jesu føðingardag 25. des.

Uppgávur:

1. Hvussu nógvar jólasálmar finna tit í Sálmabókini?
2. Hvørjar jólasálmar kenna tit?
3. Veljið ein jólasálm, sum tit ikki kenna, lesið og syngið hann.
4. Samtalið um sálmin.

Sum frá leið, komu aðrir hátíðardagar afturat, so sum Kristi himmalsferðardagur, boðanardagur Mariu og allahalgannadagur.

Trinitatisparturin av kirkjuárinum, sum er tíðin frá Kristi himmalsferðardegi til 1. sunnudag í advent, hevur ongar hátíðir. Ein merkisdagur er tó, og tað er allahalgannadagur, sum er 1. sunnudagur í november. Tá minnast vit serliga tey, sum eru deyð, og øll tey farnu, sum hava verið við til at borið gleðiboðskapin út um heimin gjøgnum tíðirnar.

Allahalgannadagur

Í Føroyum er allahalgannadagur, 1. november, minningardagur teirra sjólátnu. Hann er serliga vígdur teimum, sum eru sjólátin, og minningargudstænastur verða hildnar, og minnisvarðar vitjaðir.
Vert er at leggja til merkis, at allahalgannadagur og allahalgannasunnudagur ikki nýtist at vera sami dagur.

Uppgávur:

1. Finnið sjóferðarsálmarnar í Sálmabókini.
2. Kenna tit nakran sjóferðarsálm?

Sálmarnir og tekstarøðin

Í summum sálmabókum finna vit eisini uppskot til sálmar at syngja teir ávísu sunnu- og halgidagarnar í kirkjuárinum. Fólkakirkjan hevur fastlagdar prædikutekstir og lesistykkir til allar halgidagarnar í kirkjuárinum. Hetta nevna vit tekstarøð. Fólkakirkjan hevur tvær tekstarøðir, hin fyrra varð gjørd fyri uml. 1500 árum síðani, meðan hin seinna varð gjørd í 1885. Tað finst eisini ein triðja tekstarøð, sum var gjørd í 1958, men hon verður ikki nógv nýtt.

Skiftið millum tekstarøðirnar fer fram 1. sunnudag í advent. Reglan er, at hevur størsti parturin av kirkjuárinum óstakt sum síðsta tal t.d. 2006, so verður fyrra tekstarøð nýtt. Hevur størsti parturin av kirkjuárinum stakt tal t.d. 2007, so verður seinna tekstarøð nýtt.

Sálmagreining

Hetta er ein frymil at greina sálmar eftir, men tú eigur at hava í huga, at tað ikki altíð ber til at svara øllum spurningunum, sum verða settir í frymlinum.

1. Les sálmin fleiri ferðir.
2. Slá torfør orð upp í orðabókini.
3. Hvussu eitur sálmurin?
4. Nær er sálmurin yrktur?
5. Hvør hevur yrkt sálmin?
6. Er talan um ein upprunasálm?
7. Er talan um týddan ella umyrktan sálm, hvør er so týðarin ella yrkjarin?
8. Hvør hevur gjørt lagið?
9. Nær er lagið gjørt?
10. Kunnu fleiri løg nýtast til sálmin? Um ja, hvørji?
11. Hvat snýr sálmurin seg um?
    Skriva ein stuttan samandrátt av sálminum ella tíggju lyklaorð í sálminum.
12. Skriva nøkur fá orð, um hvat kemur tær í huga, tá ið tú lesur ella syngur sálmin.
13. Í hvønn mun er samsvar millum heiti á sálminum (fyrstu reglu í sálminum) og innihaldið?
14. Hvat ella hvørji ørindi hava mest týdning í sálminum?
15. Hvat slag av sálmi er hetta?
    a) Ein bíbilskur sálmur
    b) Ein sálmur, sum lýsir eitt ávíst huglag
    c) Ein hátíðar sálmur
    d) Ein sálmur til eitt ávíst høvi – tilburðarsálmur
    e) Finnur tú fleiri av nevndu eyðkennunum í sálminum?
16. Hvørji rím eru í sálminum?
17. Kann sálmurin býtast í partar?
18. Hvussu dámar tær sálmin? Grunda svarið.

1 Harra Guð, títt dýra navn og æra

1. Harra Guð, títt dýra navn og æra
skal um allan heim í metum vera,
hvør sálin sæla,
hvør tungt má træla,
alt, sum kann mæla,
skal teg umtala
og æra.

2. Guð er Guð, um land alt legðist oyðið,
Guð er Guð, um menniskjan øll doyði,
um ættir fara,
um øldir snara,
blant stjørnuskara
skal ótømd vara
Guðs grøði.

3. Høga høll og lága lon skal víkja,
jørð og himmal skulu bæði svíkja,
hvørt fjall, hvør sýna,
hvør tindur dvína,
men fram skal trína,
sum sólin skína
Guðs ríki.

Petter Dass 1698.
J. Dahl 1925.
Lag: Sl. 121.

Um sálmin

Harra Gud títt dýra navn og æra stendur ikki einans sum nummar 1 í Sálmabókini, men man eisini vera best kendur av flestum, tí í nógvum kirkjum verður fyrsta ørindi av sálminum sungið eftir ta ápostólsku signingina eftir prædikuna.

Sálmurin er yrktur í 1698 av norska prestinum Petter Dass (1647-1707). Petter Dass var prestur í Alstadhaug í Norðurnoregi. Um hetta mundið hildu fólk tað vera sera týdningarmikið, at kenna ta røttu læruna, - tað vil siga, at tey trúðu rætt upp á Guð, soleiðis sum kirkjumyndugleikarnir mettu, at Luthers læra skuldi skiljast. Fólk skuldu duga sína bíbliusøgu og lærubókina, tí annars vóru tey ikki mett sum vaksin og kundu ikki fáa arbeiði o.s.fr.. Hetta var lættari sagt enn gjørt, tí tá á døgum dugdu fá at lesa, og bøkur vóru sera sjáldsamar. Petter Dass, sum var skald, fór undir at yrkja

lættar sangir og vísur til kend løg og á tann hátt at læra fólkið barnalærdómin. Væl gekst. Fólk tóku væl undir við sangum og vísum hansara og lærdu fegin.

Petter Dass var sum sagt skald. Hann yrkti bæði andaligar og verðsligar yrkingar, sum eisini gjørdust kendar í Føroyum. Á tí andaliga økinum var talan um bíbilskar vísur og katekismussangir. Katekismus er tað sama sum lærubókin. Tær bíbilsku vísurnar eru serliga um hendingar úr Gamla testamenti t.d. um Job, Jefta, Gidion og Elia. Úr Nýggja Testamenti yrkir hann um Jesu líðing. Í katekismussangunum, sum eru 59 í tali, setur Dass teir fimm partarnar í Luthers *Lítlu katekismus* upp á rím. Teir fimm partarnir í lærubókini eru boðini, trúarjáttanin, faðirvár, dópurin og altargongdin.

Um faðirvár eru 9 sangir, og *Harra Guð títt dýra navn og æra* er gjørdur um bønina, "heilagt verði navnið títt". Hetta er eisini upprunaheiti á sanginum, sum hevur 16 ørindi. Í sanginum leggur Petter Dass bønina "heilagt verði navn títt" út. Guðs navn er heilagt í sjálvum sær, og tað verður eisini prísað av náttúruni, men fyrst og fremst av menniskjanum, ikki bert í orði, men eisini í verki.

Í 1925 týddi Jacob Dahl 1., 5. og 8. ørindi av *Herre Gud ditt dyre navn og ære*, og bleiv tað til sálmin *Harra Guð títt dýra navn og æra*, sum vit kenna hann úr Sálmabókini.

Uppgávur:

1. Hvat slag av sálmi er *Harra Guð títt dýra navn og æra*?
2. Hvør er boðskapurin í sálminum?
3. Hvussu verður Guð lýstur í sálminum?
4. Hvat sigur sálmurin um náttúruna og Guð?
5. Hvat vil tað siga at æra Guð?
6. Hvønn ærir tú, grundgev fyri tínum svari?
7. Hvat er at vanæra?

Samtalið

Hvat vil tað siga at halda Guðs navn heilagt?

Hvussu verður Guðs navn hildið heilagt í dag?

Sálmar til fólkaskúlan, miðdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

25 Upp alt, ið Harrin hevur gjørt

1. Upp alt, ið Harrin hevur gjørt,
hans dýrd og tign at prísa,
hans minsta skaparverk er stórt
og kann hans megi vísa.

2. Og gingu kongar fram á rað
og vístu megi mesta,
teir megnaðu ei minsta blað
á notulegg at festa.

3. Tey minstu grøs eg undrist á,
í skóg og dølum næla,
hvar skuldi eg tann vísdóm fá
um tey við skil at tala?

4. Hvat gat eg sagt, tá eg man sjá
alt lív í skógum yðja,
hvønn fuglaleik um heyg og lág
mær gleðisøgur siga.

5. Hvat gat eg sagt, tá eygað sær
á blómurnar um eingir,
og fuglasongur samfelt slær
sum túsund harpustreingir.

6. Hvat gat eg sagt, tá ið mítt sinn
í havsins djúp og grunnar
so lítið bert kann kaga inn
og sær so nógvar munnar?

7. Hvat gat eg sagt, tá eygað sær,
hvør stjørnuherar leiftra,
hvør allir brosa blítt at mær
og sál at himni veittra?

8. Hvat gat eg sagt, tá upp eg við
til Guðs í ond man fara
og síggi fylkjast lið í lið
hin blíða einglaskara?

9. Hvat gat eg sagt? Ja, málið mítt,
o Guð, ei megnar mæla,
hvør ríkt er kærleiksundur títt
og vís tín stjórn og tala.

10. Upp samfelt lov tú Drotni ber,
tú heimsins mannaskari:
Halleluja! Guð mikil er!
og himin: Amen! svari.

Brorson 1734. Chr. Matras 1920.
Lag: Sl. 350

Um sálmin

Hildið verður, at danski presturin, Hans Adolf Brorson, (1694-1764) skrivaði sálmin í Tønder uml. 1734. Eingin veit at siga við vissu um sálmin, tó halda fleiri granskarar, at Brorson fekk íblásturin til sálmin av upplivingum í náttúruni, ein dagin hann fór at vitja bróður sín, sum búði nærindis.

Náttúran sum prógv fyri at Guð er til

Fyri Brorson var náttúran við menniskjum, djórum og plantum – stórum sum smáum – eitt livandi prógv um Guðs tilveru. Tí skrivaði hann: *Hans minsta skaparverk er*

stórt og kann hans megi vísa. Hevur Guð ikki skapað himin, hvør hevur so gjørt tað? spyr Brorson. Tað eru í øllum førum ikki menniskjuni, sum hava gjørt tað. Væl kunnu vit nógv, og vit ráða fyri nógvum, men um vit tóku allar heimsins kongar við teirra megi og veldi, so kundi eingin teirra so mikið sum fest bert eitt lítið blað á ein notulegg. Hvør hevur sett bløðini á leggin? spyr Brorson, og svarið er: Tað hevur Guð gjørt! Hetta eins og náttúran øll er prógv um Guðs skapanarverk, um hans mátt og kærleika, og tessvegna eiga vit at lova honum: Halleluja! Guð mikil er, og himin: Amen! svari.

Tosið um:

1. Hvat ella hvør er Guð?
2. Kunnu vit prógva, at Guð er til?
3. Er tað nakað, sum bara Guð kann gera ella ráða yvir?
4. Samanber *Upp alt, ið Harrin hevur gjørt* við sálmin *Alt, sum frítt og fagurt er*, nr. 29 í Sálmabókini.
5. Ger eina myndarøð burtur úr sálminum.

29 Alt, sum frítt og fagurt er

1. Alt, sum frítt og fagurt er,
alt, sum blítt á foldum fer,
er tað lítið, er tað stórt,
góði Guð tað hevur gjørt.

2. Summarfleyr um bygd og bø,
sólskin yvir reyn og rød,
glitrandi sum gull á vág,
góðum Guði kemur frá.

3. Blomstur smá um dal og líð,
yndislig á summartíð,
brosandi í litum bjørt,
góði Guð tey hevur gjørt.

4. Gróður upp úr døkku mold
heldur ferføtt dýr við hold;
fugl í haga, fisk í hav,
góði Guð teim lívið gav.

5. Títlingar um líð og ong
teir sín glaða sólskinssong
senda yvir fjøll og dal;
«Alt Guð gjørdi okkum væl.»

6. Fólki gav hann vit og mál,
kraft í kensluríka sál,
troyst og hjálp á mangan hátt.
O, sum Guð vár ger oss gott!

7. Blíður hann sítt sannleiksorð
sendi okkum higar norð,
vítt um heim hans náði røkk.
Honum veri prís og tøkk!

Mikkjal á Ryggi.
Lag: Sl. 7.

Skapanin

Í fyrstuni skapaði Guð himmalin og jørðina. Jørðin var oyðin og myrk, og andi Guðs lá yvir vøtnunum. Tá segði Guð: Verði ljós, og tað varð ljós.
Guð sá, at ljósið var gott, og hann skildi tað frá myrkrinum og kallaði tað dag; men myrkrið kallaði hann nátt. Soleiðis skapaði Guð alt tað, ið til er, í seks dagar, og tað bara við at siga tað, so var tað.
Hann setti himmalin sum eitt hválv yvir jørðina at skilja millum vøtnini í erva og í neðra. Landið skildi hann frá sjónum og læt øll sløg av trøum og urtum vaksa á landinum.
Á himmalin setti Guð sólina at lýsa um dagin og mánan og stjørnurnar at lýsa um náttina.
Í sjógvin skapaði hann fiskar og onnur havdýr.
Fuglarnar skapaði hann at flúgva í luftini og øll sløg av dýrum at liva á landjørðini.
Tá ið Guð hevði skapað alt hetta og sá, at tað var gott, helt hann tó okkurt vera eftir enn, og hann segði: Vit vilja gera menniskjur eftir okkara mynd, okkum líkar, og tær skulu ráða yvir øllum feðnaðinum á jørðini.
Guð skapaði so mannin, Ádam, á tann hátt, at hann evnaði hann til úr mold og blásti lívsanda í nasarnar á honum, so at hann tók við lívi. Ein urtagarð plantaði Guð í Eden, har læt hann vaksa nógv trø, sum vóru bæði vøkur og góð at eta av, í miðjum garðinum vuksu tvey trø. Annað træið var lívsins træ, og hitt var kunnleikans træ.
Guð fór so við Ádami út í garðin til tess, at hann skuldi dyrka hann og ansa eftir honum, og hann segði við Ádam: Av øllum trøum er tær loyvt at eta eftir vild; men av træi kunnleikans um gott og ilt skalt tú ikki eta; tí at so skjótt, sum tú etur av tí, skalt tú vissuliga doyggja.
Síðani segði Guð: Ikki er gott, at maður er einsamallur; eg vil gera honum medhjálp, sum hóskar honum. Guð leiddi øll djór fram fyri Ádam, og Ádam setti nøvn á tey. Men fann einki sum hann vildi hava til medhjálp. Tá læt Guð Ádam falla í fastan svøvn og tók so eitt rivjabein úr síðuni á honum og gjørdi eina konu av tí. Tá ið hann hevði gjørt hana, leiddi hann hana fram fyri Ádam.
Ádam segði, tá hann sá hana: Hesa ferðina er tað bein av mínum beinum og hold av mínum holdi. Tí fer maður frá faðir sínum og móður síni og heldur seg aftur at konu síni, og tey verða sum eitt. Og Guð vælsignaði tey og segði: Verið barnrík og fjølgist og uppfyllið jørðina og leggið hana undir tykkum og ráðið yvir havsins fiskum og yvir himmalsins fuglum og yvir øllum villdjórunum, sum rørast á jørðini. Guð sá at alt, sum hann hevði gjørt, og tað var sera gott.
Alt hetta skapaði hann í seks dagar. Hin sjeynda dagin hvíldi hann frá øllum arbeiði. Hann vælsignaði dagin og helt hann heilagan.

Bíbliusøgur úr Gamla Testamenti eftir Svenning Tausen 1987 bls. 7-8

Um sálmin

Skaldið Mikkjal Dánjalsson á Ryggi (1879-1956) yrkir her um skapanarverkið. Skapanarverkið lærir okkum nakað um Guð og ber boð um Guðs góðsku. Alt, Guð skapti, var væl gjørt, og hann gleddist um sítt skapanarverk. Hyggja vit rundan um okkum, síggja vit Guðs dýrd, - vit síggja hana í sólini, sum Guð letur skína, í blómunum, gróðrinum, og djórunum. Menniskjunum gav hann vit og kenslur. Vit síggja eisini Guðs náði til okkara, og hann sendi oss sítt sannleiksorð higar norð. Tí eiga vit eisini at prísa og takka honum og nýta hansara gávur við skili.

Uppgávur:

1. Les skapanarsøguna, sum Mikkjal á Ryggi nýtir sum íblástur. Finn tey støðini í skapanarsøguni, sum skaldið hevur nýtt.

2. Sálmurin kennist heimligur. Hvat er tað, sum ger sálmin heimligan?

3. Hygg í 6. ørindi. Hvørja gávu gav Guð menniskjanum?

4. Í 7. ørindi stendur: Blíður hann sítt sannleiksorð sendi okkum higar norð. Hvat meinar Mikkjal á Ryggi við?

5. Les í skapanarsøguni, um Guð setur menniskjuni í nakra serstøðu í mun til náttúruna?

Samrøðuevni:

Menniskja og náttúran

Sálmar til fólkaskúlan, miðdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

48 Lítla Guðs barn, hvat sakar teg?

1. Lítla Guðs barn, hvat sakar teg?
Faðir tín vísir tær himnaveg.
Hann er so ríkur, góður við,
trygt gongur tú við Harrans lið.
Guð havi lov.

2. Føði og klæði, hús og heim,
skulu Guðs børn kenna sakn av teim?
Guðs orðið føðir okkum øll,
børn eiga heim í faðirs høll.
Guð havi lov.

3. Fuglur í haga, urð og lund
syngur á morgni og kvøldarstund,
leitar sær stein á grønu ong,
svevur har søtt sum barn í song.
Guð havi lov.

4. Ikki hann veltir ella sá'r,
sankar ei saman for næsta ár;
tó, har sum bøndur líða neyð,
har finnur fuglur dagligt breyð.
Guð havi lov.

5. Blóman er yndislig at sjá,
virkar sær tó ongan klædnatráð;
og móti klæðum, sum hon ber,
drotningarbúni følin er.
Guð havi lov.

6. Blómur tær spretta, følna út,
ei manst tú meta tær, himna Guð,
móti teim kæru børnum smá,
sum fyri ásjón tíni stá.
Guð havi lov.

7. Lítla Guðs barn á foldum her,
halt tú teg at tínum faðir nær,
spyr um hans makt og kærleik við,
lít tú á hann og hvíl í frið.
Guð havi lov.

8. Føði og klæði faðir vár
gevur í morgin tær sum í gjár;
og tá tú svevur deyðans blund,
arvar tú dýrd hans somu stund.
Guð havi lov.

Grundtvig 1855-56. Símun av Skarði.
Lag: Sl. 211.

Danski presturin Nikolaj Frederik Severin Grundtvig (1783-1872) yrkti sálmin í 1855-56, men sálmurin bleiv ikki kendur fyrr enn næstan 15 ár seinni. Sjálvur gav Grundtvig sálminum yvirskriftina: *Guðs umsorgan*. Grundtvig yrkir her á ein sera einfaldan hátt um Jesu boðskap, sum vit finna hann í fjallataluni, Matt. 6,25-34, har Jesus sigur, at vit ikki skulu stúra fyri nøkrum, tí at Guð hevur umsorgan fyri okkum.

Grundtvig sigur, at Guðs børn eiga at líta á Guð faðir, tí hann hevur umsorgan fyri okkum eins og fyri øllum skapanarverkinum. Tí eiga vit ikki at óttast og kunnu trygg gleðast og syngja faðiri okkara lovsong: Guð havi lov!

Stúrið ikki

Av hesi søk sigi eg tykkum: Stúrið ikki fyri lívi tykkara, hvat tit skulu fáa at eta, og hvat tit skulu fáa at drekka; ei heldur fyri likami tykkara, hvat tit skulu fáa at fara í. Er ikki lívið meiri enn maturin og likamið meiri enn klæðini?

Hyggið at himmalsins fuglum; teir sáa ikki, ei heldur teir heysta og bera ei heldur saman í løður, og himmalski faðir tykkara føðir teir; eru tit ikki mikið meir verdir enn teir?

Men hvør tykkara kann við at stúra leggja eina alin aftur at ævi síni?

Og hví stúra tit fyri klæðunum? Gevið tykkum far um liljurnar á markini, hvussu tær vaksa; ikki tær arbeiða, ei heldur tær spinna;

men eg sigi tykkum, at ikki sjálvur Sálomon í allari dýrd síni var skrýddur eins og ein teirra.

Men tá ið nú Guð soleiðis klæðir grasið, sum í dag stendur á markini, men í morgin verður blakað í ovnin, man hann tá ikki mikið meir klæða tykkum, tit fátrúnu?

Tí eiga tit ikki at stúra og siga: Hvat skulu vit fáa at eta? ella: Hvat skulu vit fáa at drekka? ella: Hvat skulu vit fáa at lata okkum í?

Tí at eftir øllum slíkum søkja heidnir menn; og tí at himmalski faðir tykkara veit, at tykkum tarvast alt slíkt.

Men søkið fyrst Guðs ríki og rættvísi hansara, so skal alt hetta verða tykkum givið umframt.

Stúrið tí ikki fyri deginum í morgin; tí at morgindagurin man stúra fyri sínum egna. Hvør dagur hevur nóg mikið í síni plágu. *Matt. 6, 25-34*

Uppgávur:

1. Flokkurin og lærarin skifta orð um, hvat tað er at stúra?
2. Samanberið ø. 3 og 4 við Matt. 6,26. Hvat man Grundtvig vilja siga okkum her?
3. Samanberið ø. 5 og 6 við Matt. 6,28-34. Hvat man Grundtvig meina við her?
4. Hvat sigur 8. ørindi?
5. Halda tit, at sálmurin lærir tykkum nakað?

Aðrar uppgávur:

Ger eina mynd av tí ørindinum í sálminum, sum tær dámar best.

82 Ver vælkomið, Harrans ár

1. Ver vælkomið, Harrans ár,
sum ber fagnaðarboð!
Jólanátt, tá Guðs orð fór í hold,
varð ljósið úr erva birt upp á fold.
Vælkomið nýár! Væl vær fagnum tær.

2. Ver vælkomið, Harrans ár,
sum ber fagnaðarboð!
Páskamorgun, tá Krist reis úr grøv,
tá sigraði lívið um lond og høv.
Vælkomið nýár! Væl vær fagnum tær.

3. Ver vælkomið, Harrans ár,
sum ber fagnaðarboð!
Hvítusunnu tá var tað so brátt,
at andin gav veraldar veikleika mátt.
Vælkomið nýár! Væl vær fagnum tær.

4. Ver vælkomið, Harrans ár,
sum ber fagnaðarboð!
Harrans ár, ið ger hjørtuni glað,
nú ber okkum gleði hvønn Harrans dag.
Vælkomið nýar! Væl vær fagnum tær.

Gamal danskur sálmur.
Grundtvig 1849. G. Bruun.
Lag: Sl. 361.

Um sálmin

Í 1849 skrivaði Nikolaj Frederik Severin Grundtvig (1783-1872) tveir sálmar við heitinum: *Ver vælkomið Harrans ár*. Annar sálmurin er ein adventssálmur nr. 82 í Sálmabókini og hin sálmurin, nr. 532 í Sálmabókini, er ein nýggjárssálmur. Hugskotið til sálmarnar fekk Grundtvig frá soninum, Svend Grundtvig, sum vísti pápanum eina gamla danska fólkavísu, sum Grundtvig umyrkti fyrst til adventssálmin, og síðani sama mánað umyrkti hann vísuna til ein nýggjárssálm.

Í sálminum yrkir Grundtvig um allar tær stóru kirkjuhátíðirnar. Hann greiðir eisini frá, hví vit halda jól, páskir og hvítusunnu, men hann gloymir ikki gerandisdagin og sunnudagin, tí ynskir hann fagnaðarorðunum – evangeliunum, sum ber okkum gleði hvønn Harrans dag, vælkomnum.

Uppgávur:

1. Hvat merkir adventstíðin? Sí blas. 7 (Advent og jól)
2. Sálmurin umtalar tær stóru kirkjuhátíðirnar. Ger eina mynd av kirkjuárinum.
3. Ger eina mynd av álmanakkaárinum.
4. Samanber hesar myndirnar. Hvønn mun sært tú?
5. Finn allar frídagarnar í álmanakkaárinum og ger av, um teir hava samband við okkara átrúnað, ella um teir hava aðra grund?

103 Tað sótu seyðamenn á vakt

1. Tað sótu seyðamenn á vakt
og goymdu sínar smalur,
alt fylgið hevði stilt seg lagt,
ei lamb í líðum spælir,
sjálvt varnir hundar durva smátt,
í dølum valdar dimma nátt,
um heimin Harrans friður.

2. Tá lýsir bjart um fjallagrein,
og fram ein eingil trínur,
hans mál var milt, hans rødd var rein,
hans andlit fagurt skínur;
til hirðarnar hann talar so:
«Eg beri tykkum fagnarboð,
alt fólkið kann seg gleða.

3. Ein frelsari nú føddur er,
í dag til tykkum sendur,
hin Harri Krist hann navnið ber,
í Dávids stað - ókendur;
men prógv fullgott tit skulu fá:
í fjósi lágt á krubbustrá
eitt lítið barn tit finna.»

4. Brátt syngur einglaflokkur blítt:
«Halleluja, hosianna!
Guðs friður yvir verøld vítt!
Guðs tokki millum manna!
Og heiður veri himladrott'!»
Men hirðarnir sær skunda brátt
sín frelsara at skoða.

5. Takk fái fyri jólaboð,
tú einglaherur ljósi!
Takk, Guð, sum elskar okkum so!
Takk, barnið føtt í fjósi!
So lítillátin, Harri mín,
tú vart, - um heim nú heiður tín
ótaldar tungur bera.

6. Sum hirðarnir eg fara vil
mín frelsara at finna;
hans kærleiki mær hjálpir til
tann frið, ið eg vil vinna.
Hans jólaboð er besta troyst;
av syndaskuldum sál mín loyst
mót himli seg kann hevja.

Mikkjal á Ryggi.
Lag: Sl. 314.

Hirðarnir

Og tað vóru hirðar har í sama bygdarlaginum, sum lógu úti á markini um náttina og goymdu at seyðafylgjum sínum. Og sí, eingil Harrans stóð hjá teimum, og dýrd Harrans ljómaði rundan um teir, og teir vórðu ógvuliga óttafullir. Og eingilin segði við teir: “Óttist ikki; tí sí, eg kunngeri tykkum eini stór gleðiboð, sum skulu verða fyri alt fólkið. Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði! Og hetta skulu tit hava til merkis: Tit skulu finna eitt barn reivað og liggjandi í eini krubbu.” Og í somu stund var hjá einglinum ein fjøld av himmalskum herskarum, sum lovaðu Guði og søgdu: “Heiður veri Guði í hægsta himli, og friður á jørð, og í menniskjum góður tokki!”
Og tað hendi, tá ið einglarnir vóru farnir frá teimum aftur til himmals, tá søgdu hirðarnir hvør við annan: “Latum okkum nú fara beinanvegin til Betlehem og vita um hesi tíðindi, sum hend eru, og sum Harrin hevur kunngjørt okkum.”

Og teir fóru við skundi hagar og funnu bæði Mariu og Jósef og barnið liggjandi í krubbuni. Og tá ið teir sóu tað, søgdu teir frá teimum orðum, sum talað høvdu verið til teirra um hetta barn. Og øll, ið hoyrdu tað, undraðust á tað, sum teimum varð sagt av hirðunum. Men Maria legði sær øll hesi orð í geyma og hugsaði um tey í hjarta sínum.

Og hirðarnir fóru avstað aftur, og teir lovaðu og prísaðu Guði fyri alt tað, sum teir høvdu hoyrt og sæð, soleiðis sum tað hevði verið sagt við teir.

Luk. 2.8-20

Sálmar til fólkaskúlan, miðdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

Mikkjal Dánjalsson á Ryggi (1878-1956) yrkti sálmin 25.12.1912. Mikkjal á Ryggi yrkir her um tann partin av jólaboðskapinum, tá hirðarnir fáa boð um, at Jesus er føddur. Hann sigur frá einglinum, sum ber boðini, frá einglafjøldini, sum sang lovsong og frá hirðunum, sum fara at finna frelsaran. Skaldið endar við bønini, at hann og vit, eins og hirðarnir, fara at finna frelsaran fyri at lovsyngja honum.

Uppgávur

1. Lesið tekstin hjá Lukasi.
2. Samanberið sálmin við tekstin hjá Lukasi. Hvat hevur Mikkjal á Ryggi nýtt úr tekstinum?
3. Gerið sálmin til ein leik, sum verður framførdur.

105 Jól hava einglaljóð

1. Jól hava einglaljóð,
øll so fró
á mikla hátíðsdegi
við gleði
vit honum prís nú syngja,
ið føddur varð í dag.
Nú jólaklokkur ringja,
gerst barnalundin glað;
djúpt sálarstreingir ljóða
í tøkk til Drottin góða;
Guðs einglar syngja við
himnaboð um frið.

2. Heilagu jólanátt
loft var blátt,
tá tók á himnaboga
at loga
ein stjørna bjørt, sum eingin
fyrr makan hevði sæð,
tað hoyrdist sús av veingjum,
eitt fagurt einglalag;
og hirðar undrast sára,
ein lýsti glæman klára
um einglarnar, ið tá,
sungu teimum hjá.

3. Farið úr barmi út,
sótt og súr!
Hitt myrka vald er svunnið,
nú runnið
er bjarta lívsins ljósið,
tí frø teg, sál, ver glað!
Í Betlehem, í fjósi,
ein frelsari í dag
er føddur tær at grøða
tey syndasár, ið bløða.
So einglaliðið kvað
við halleluja.

4. Signaða stjørnusól,
enn um jól
tú bjart kanst okkum lýsa
og vísa
á veg, so fram vit vinna
sum hinir vísmenn, tá
teir vildu barnið finna,
lat okkum Drottin sjá!
Tá himnaleið er funnin
og lívsins krúna vunnin.
Leið oss við lov og prís
inn í paradís!

J. Nolsøe.
Lag: Sl. 185

Um sálmin

Jógvan Nolsøe (1884-1966) yrkti sálmin. Jógvan Nolsøe nýtti tann danska sálmin *Julen har englelyd* sum fyrimynd, men tað er tó ikki talan um eina umyrking, hóast teir hava sama lag, byrja á sama hátt, og endin eisini líkist.

Sálmurin er ein lovsangur til Jesus, sum varð føddur jólanátt. Hann greiðir frá týdninginum av tí, sum hendi, og endar við einari bøn um, at eins og stjørnan vísti vísmonnunum, so skal boðskapurin eisini vísa okkum veg til Paradís. Sálmurin sigur frá einglunum, sum syngja lovsong, og eggjar okkum at syngja lovsong á sama hátt.

Sálmar til fólkaskúlan, miðdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

Í Bíbliuni hoyra vit ofta um einglar. Eisini talar Bíblian um fleiri sløg av einglum, t.d. kerubar, seráfar, høvuðseinglar, vanligar einglar og einglaherar. Einglarnir eru Guðs sendiboð og gera tað, Guð vil. Í NT lesa vit, at einglarnir tæntu Jesusi. Gabriel varð sendur at boða frá, at Jóhannes og Jesus skuldu verða føddir. Kvinnurnar møttu einum eingli við Jesu grøv, eftir at Jesus var risin upp o.s.fr. Í GT lesa vit m.a., at Guð setti kerubarnar at verja Edensgarð, tá ið Ádam og Eva vóru rikin út haðani. Einglar komu at vitja Ábraham, og Jákup droymdi um einglar.

Eisini í dagligari talu hoyra vit um einglar. Vit hoyra um menniskju, sum hava sæð einglar, tá ið teimum onkursvegna hevur tørvað hjálp og stuðul. Vit kenna eisini nógvar myndir av einglum, sum m.a. ansa eftir menniskjunum. Tað er vanligt at hoyra fólk siga, at tey hava havt einglaverju, tá ið okkurt óskiljandi er hent, og tey vóru í vanda. Eisini hoyra vit fólk tala um, at tey hava havt ein verndareingil, ella at ein eingil helt hondina yvir teimum. Allar hesar útsagnirnar hava tað til felags, at menniskjuni ásanna, at har er okkurt meira uppií enn tað, sum vit kunnu greiða frá, og at tey eru sloppin betur gjøgnum vandarnar ella trongdirnar, enn væntast kundi við vanligum viti og skili.

Tað munnu vera eins nógvar meiningar um, hvussu ein eingil sær út, sum fólk, ið verða spurd, tí hvat er ein eingil? Er tað ein vera, sum ikki er av hesum heimi (yvirnatúrlig vera), ella eitt vanligt menniskja, sum vísir næstakærleika?

Uppgávur

1. Trýrt tú, at einglar eru til? Grundgev títt svar.
2. Far inn á alnetið og finn nakrar myndir av einglum
3. Ger eina mynd á telduni, sum vísir einglasongin jólanátt ella eina myndakollagu (límmynd, myndaklipp) av einglum.

123 Dýrasti Jesus

Dýrasti Jesus,
drottur alla drotta,
sonur av Guði og Mariu moy,
teg vil eg elska,
teg vil eg æra,
tú lív mítt ert, mín dýri eyð'.

2. Føgur er ongin,
fagrari er lundin,
tá hon á vári setur blað;
Jesus er fagrari,
Jesus er reinari,
hann okkum hjørtuni ger glað.

3. Bjart lýsir sólin,
mildari er mánin,
glógvandi himmalsins stjørnulind;
meir ljómar Jesus,
meir lýsir Jesus
enn himmalsins øll glæstrimynd.

4. Yndig er blóman,
vakrari er menniskjan,
meðan ið frískt er ungdómsins vár;
blóman má følna,
menniskjan vikna,
men Jesus elda eingi ár.

5. Alt, sum á himni
og á jørð er fagurt,
lænir sær ljóma og dýrd frá tær,
Jesus, vit biðja,
okkum tú eigi,
hvørt okkum leiði fótafar!

Gamal týskur songur. J. Dahl 1925. Lag: sum Sl. 78.

Um sálmin

Dýrasti Jesus er ein gamal týskur sálmur, sum Jacob Dahl (1878-1944) týddi í 1925. Í sálminum verður Jesus samanborin við skapanarverkið. Skapanarverkið er stórbært, men niðurstøðan er púra greið: Einki her á jørð kann samanberast við Jesus, sum her verður lýstur bjartari enn sólin og mildari enn mánin og himmalsins glæstrimynd.

Uppgávur

1. Hvussu lýsir skaldið Jesu dýrd?
2. Hvat sigur skaldið um menniskjað og mannalívið?
3. Hvat heldur skaldið um alla dýrd heimsins?
4. Finn tað ørindi í sálminum, sum tær dámar best, og grundgev fyri, hví hetta ørindi er best?

197 Sum vársól lýsir yvir fold

1. Sum vársól rísur yvir fold,
reis Jesus upp úr døkku mold
til lívs, so ei finst líki;
tí skal, alt meðan verøld stár,
nú eftir vetur koma vár
við gleði í Guðs ríki.

2. Sum fuglamongd í urð og líð
við fagnarljóði alla tíð
hin bjarta várdag boðar,
so tunga hvør, sum syngja kann,
lovsyngur deyðans yvirmann,
tá páskamorgun roðar.

3. Sum blómur allar fríðka jørð,
sum líðir grønkast, grasið grør,
tá lýkkan kemur blíða,
so blómar alt við Jesus Krist
til fólkagagns og gróðurs vist
nú, og sum tíðir líða.

Grundtvig 1846. J. Dahl 1928.
Lag: Sl. 308.

Um sálmin

Sum vársól lýsir yvir fold er koralin úr einari páskakantatu (kórverki), sum danski presturin, Nikolaj Frederik Severin Grundtvig (1783-1872), skrivaði til páskagudstænastuna í Christiansborgar slottskirkju í 1846. Sálmurin varð sungin, tá ið Grundtvig fór til gravar.

Sálmurin er ikki einans ein páskasálmur, men eisini ein vársangur. Grundtvig samanber várið í náttúruni við Jesu uppreisn, og av Jesu uppreisn skal tað, so leingi verøldin stendur, eisini vera ávøkstur í Guðs ríki. Várið kemur við gróðri, og menniskjað gleðist um skapanarverkið og lívið; tí lovsyngja vit honum, sum lívið gav og deyðan vann. Eins og várið virkar í náttúruni, soleiðis virkar Guðs kærleiki til okkara við Jesusi Kristi, at alt andaligt lív blómar til fólkagagns og grøði.

Uppgávur:

1. Greina sálmin eftir frymlinum.
2. Hví hevur Grundtvig nýtt várið sum mynd upp á Jesu uppreisn?
3. Hvørjar tankar fært tú, tá ið tú syngur sálmin? Skriva minst 10 lyklaorð.
4. Ger eina yrking um várið við lyklaorðunum.

216 Frøi er í himli høga!

1. Frøi er í himli høga!
Lovsong við so føgrum lag
allar einglarøddir kvøða:
«Jesus kemur heim í dag!
Endað er hans útiferð,
fullført er hans megnargerð.
Heim hann kemur til sín faðir!
Hátt lovprísið honum glaðir!

2. Opnið allar himlagrindir!
Jesus fagran sigur vann,
særdur fyri heimsins syndir
heiðurskrýndur kemur hann!
Syrgdu vit um Golgata,
syngjum nú halleluja!
Síggj hann nú við halgum skara
út á Oljufjallið fara!»

3. Signandi hann hendur breiðir,
so gerst skilnarstundin blíð.
Vinaflokkur hann eygleiðir,
inntil yvir bjørtum ský
hann ei longur var at sjá;
sælir hans apostlar tá
til Jerúsalems heim vendu,
vænta Halga Andans sendu.

4. Sigurskrýndur fram hann trínur
til síns faðirs kongastól,
ljómin um hans andlit skínur
bjartari enn summarsól.
Hoyr nú hátt við hørpuslátt:
«Heiður veri himladrott'!»
Í sítt hásæti hann stígur,
allur einglaskarin nígur.

5. Syng so hvør ein mannatunga!
Gleð teg so, hvør kristin tjóð!
Latum upp móti himni runga
lov og tøkk og heiðursljóð.
Fjónaður á foldum gekk,
hægstu dýrd í himli fekk
hann, sum frelsu bar til manna;
prísið honum! Hosianna!

6. Skýggj, sum her mær sýnið forðar,
fjalir ei meg fyri tær,
gjøgnum bjørg og bláar skorar
fullvæl eyga títt meg sær;
gerst mær verðin trong og vánd,
rættir tú mær hjálparhond;
og til síðst tú vilt mær hýsa.
Hátt skal hjarta mítt tær prísa!

Mikkjal á Ryggi.
Lag: sum Sl. 22.

Himmalferðin

Og hann førdi teir út, yvir ímóti Betániu, og hann hevði upp hendur sínar og vælsignaði teir. Og tað hendi, í tí hann vælsignaði teir, skildist hann frá teimum (og varð lyftur upp til himmals). Og teir tilbóðu hann og vendu aftur til Jerúsalem við miklari gleði. Og teir vóru støðugt í halgidóminum og lovaðu Guði. *Luk. 24,50-53*

Sálmar til fólkaskúlan, miðdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

Um sálmin

Skaldið Mikkjal Dánjalson á Ryggi (1879-1956) yrkti sálmin í 1944. Vit vita einki um, hvaðani Mikkjal fekk hugskotið til sálmin, men møguliga hevði hann frásøgnin hjá Lukasi í huga, tá ið hann yrkti sálmin.

Í sálminum ímyndar skaldið sær, hvussu Jesu heimkoma hevur verið. Vit hoyra um frøina í himlinum, har einglarnir syngja fagnaðarsong. Síðani fylgja vit Jesusi, tá ið hann seinastu ferð fer frá lærusveinunum (Luk. 24,50-53). Jesus fær eina stórfingna móttøku. Tað er sigursharrin og himmalsins kongasonur, sum kemur heim og fær dýrd sína aftur - ta dýrd, hann segði frá sær, tá ið hann gjørdist menniskja. Burtur er deyðaræðslan og líðingin. Nú er sigurin vunnin, og hann trínur fram fyri faðirin, meðan einglarnir níga. Skaldið mælir okkum til at syngja takkarljóð til hansara, sum bar frelsuna til manna, til hansara, sum sær alt og kann veita okkum hjálparhond .

Uppgávur

1. Hvussu verður Jesus lýstur í sálminum?
2. Hvussu er huglagið í sálminum?
3. Hvat fáa vit at vita um einglarnar?
4. Hvør er hin halgi skarin?
5. Hvat hendi, tá ið ápostlarnir fingu Heilaga andan?

231 Vit Halgan Anda biðja nú

1. Vit Halgan Anda biðja nú
at gera okkum samd í vón og trú
og at heimsins enda
kirkjuna at verja,
neyð og vandum venda,
sum á vilja herja.
Kyrie eleis!

2. Tú lívsins ljós, lýs okkum svá,
at Harrans dýrd vit fáa øll at sjá,
so vit honum fegin
fylgja allar leiðir,
hann, sum okkum vegin
til Guðs ríki greiðir.
Kyrie eleis!

3. Tú kærleiks andi, birt í sál
tann kærleikseld, sum halgar verk og mál,
so í Harrans gleði
sameind øll vit standa,
og hans kærleiks megi
signar hug og anda.
Kyrie eleis!

4. Guðs andi, lætta sorg og harm,
veit frið, sum barn hann fær við
móðurbarm;
um í tungum móði
daprir dagar líða,
uggarin hin góði,
gev tú vón at stríða.
Kyrie eleis!

5. Ja, kærleiks andi, ger tað svá,
at vit gudsbarna fund øll koma á;
tá er endað sorgin,
tá er perlan funnin,
opnað himnaborgin,
deyðans máttur vunnin.
Kyrie eleis!

Týskur sálmur úr 12. øld.
Luther 1524. J. Dahl 1927.
Lag: Sl. 365.

Perlan

Uppaftur er himmiríkið líkt einum keypmanni, ið sóknaðist eftir vøkrum perlum. Og tá ið hann fann eina sera dýrabara perlu, fór hann avstað og seldi alt tað, ið hann átti, og keypti hana.
Matt. 13,45-46

Um sálmin

Upprunin til henda sálmin, sum Jacob Dahl (1878-1944) próstur týddi, er at finna í Týsklandi í 11. øld. Tá tók tann siðurin seg upp, at kirkjufólkið sang eitt ørindi, leis á týskum undir tí latínsku gudstænastuni, og var hetta tað einasta, kirkjufólkið slapp at syngja. Ørindið endaði næstan altíð við orðunum *Kyrie eleis*. Tí vóru hesi ørindini nevnd leise, leisur. Hesin siðurin breiddi seg um alt landið. Fyrsta ørindið av *Vit Halgan Anda biðja nú* er eitt tílíkt ørindi. Tað var siður, at á hvítusunnu sang kirkjufólkið fyrsta ørindið av sálminum, meðan ein trædúgva varð sigin niður undan

kirkjuloftinum, ella ein livandi dúgva varð slept á flog gjøgnum kirkjuna. Dúgvan skuldi ímynda hin heilaga andan.

Tá ið týski trúbótarmaðurin Martin Luther (1483-1546) fór undir at yrkja sálmar á týskum, tók hann hetta ørindið og nýtti tað so at siga óbroytt, sum fyrsta ørindi í sálminum *Vit Halgan Anda biðja nú*. Síðani yrkti hann trý ørindi afturat um ljósins anda, kærleiks- og troystarandan. Leingi hevði sálmurin einans fýra ørindi, men so kemur danski presturin N.F.S. Grundtvig upp í leikin, og hann yrkir fimta ørindi.

Niðurlagið *Kyrie eleis* t.e. Harri miskunna er tað sama, sum varð nýtt í 11. øld í Týsklandi.

Uppgávur:

1. Hvat verður biðið um í fyrsta ørindi?
2. Hví nevnir skaldið andan við fleiri nøvnum?
3. Hvør er uppgávan hjá Heilaga andanum?
4. Í fimta ørindi verður sagt: Tá er perlan funnin. Hetta er úr einum líknilsi Jesus segði í Matt. 13,45-46. Hvussu skal hetta skiljast?

242 Kirkjan hon er eitt gamalt hús

1. Kirkjan hon er eitt gamalt hús,
stendur, um tornini falla;
torn sukku eftir torn í grús,
klokkur enn kima og kalla,
kalla á gomul og á ung,
mest tó á sál, sum troytt og tung
stundar á æviga hvílu.

2. Harrin ei býr í húsum teim,
sum mannahendur her gera,
templini øll um allan heim
kunnu hans dýrd ikki bera;
tó hevur bústað bygt sær her
algóði Guð, sum dýrur er,
reistan av moldum í náði.

3. Í húsi Guðs og kirkju nú
vit eru livandi steinar,
sum undir krossmerki skírn og trú
í Harrans miskunn sameinar;
um vit her hesum foldum á
bert vóru tvey, tó okkum hjá
Harrin var við sínum veldi.

4. Hvar so um alla heimsins grund
frelsarans navn vit á heita,
sjálvur hann kemur har á fund,
vil okkum sælan frið veita,
Andans og lívsins orð hans blíð
nær eru okkum hvørja tíð,
sálina ugga og lívga.

5. Hús tó, sum bera kirkjunavn,
bygd upp til frelsarans æru,
har sum hann tekur børn í favn,
eru sum heimini kæru.
Mangt signað orð har fram er ført,
har hevur sáttmál við oss gjørt
hann, sum oss himmiríki unnar.

6. Funturin minnir um skírnarnáð,
altar um kvøldmáltíð sæla,
orðið um Harrans hjálparráð
altíð skal her verða talað;
um øldir skifta, fara ár,
Harrin í dag er sum í gjár,
sama er trúgvin og skírnin.

7. Gævi tá Guð, ið hvussu er,
altíð, tá klokkurnar kalla,
fegið til kirkju fólkið fer,
samlynt um verðina alla!
«Verðin væl ei, men tit meg sjá,
alt, tað eg sigi, verður svá,
veri Guðs friður við øllum!»

Grundtvig 1837. J. Dahl 1925.
Lag: Sl. 186 a og b.

Um sálmin

Tað tók danska prestinum N.F.S. Grundtvig (1783-1872) 31 ár at skriva sálmin *Kirkjan hon er eitt gamalt hús*. Sálmurin var yrktur í 1837, men í arbeiðspappírunum hjá honum sæst, at sætta ørindi voldi honum trupulleikar. Grundtvig vildi hava eitt ørindi um tey bæði sakramentini í tí protestantisku kirkjuni – dópin og kvøldmáltíðina. Hann gavst ikki, fyrr enn tað eydnaðist, tí gjørdist sálmurin ikki liðugur fyrr enn í 1868.

Sálmurin er týddur til mong mál m.a. grønlendskt, íslendskt, norskt, enskt og svenskt. Sálmurin er eisini týddur til ungarskt. Søgan um ta týðingina er hendan. Undir øðrum heimsbardaga í 1945 var Budapest fyri ógvisligum luftálopi. Í einum bumbuskýli undir jørð, sat ein bispur, Ordass at navni, og meðan hann hoyrdi, hvussu tann ungarski høvuðsstaðurin varð soraður sundur, sat hann og týddi regluna: ”Torn sukku eftir torn í grús…….”

Orðið kirkja kann hava tveir týdningar, 1) Kirkjan sum bygningur og 2) Kirkjan sum felagsskapur. Í sálminum nýtir Grundtvig orðið kirkja í báðum týdningum. Grundtvig kendi seg væl í kirkjuni, og hann føldi seg heima har. Tí samanber hann kirkjuna við húsini, vit búgva í: okkara heim, men sigur Grundtvig, tað er tó ein týðandi munur: Sjálvt um vit nevna kirkjuna ”Hús Guðs”, so býr Guð ikki í kirkjuni. Kirkjan kann ikki rúma Guðs dýrd, men menniskjuni kunnu rúma Guðs dýrd: *Tó hevur bústað bygt sær her algóði Guð, sum dýrur er, reistan av moldum í náð.*

Tessvegna er tað ikki kirkjan sum bygningur, ið hevur størsta týdningi, men kirkjan sum felagsskapur. Kirkjan sum felagsskapur er bygd av livandi menniskjum – livandi steinum. Hin vegin er kirkjan sum bygningur bygd av deyðum steinum.

Uppgávur

1. Guðs hús:

a) Hvørji Guðs hús eru í tínum nærumhvørvi?

b) Er munur á, hvussu tey síggja út, og hvussu tey eru innrættað, og hví er júst hendan innrættingin nýtt? Tú kanst t.d. biðja prest og samkomuleiðarar greiða frá.

c) Samanber tey ymisku Guðs húsini. Hvat hava tey felags, og hvat brýtur av?

2. Felagsskapur:

a) Ger ein lista yvir ymiskar felagsskapir – familju, flokk, ítrótt, trúarfeløg áhugafeløg o.s.fr.
b) Hvat fer fram í teimum ymisku felagsskapunum?
c) Hvussu gerst tú limur í felagsskapinum?
d) Hvussu melda fólk seg út úr felagsskapinum? Ber tað altíð til at melda seg út?
e) Ber tað til at halda seg burtur frá øllum felagsskapum?
f) Eru allir felagsskapir líka gagnligir? Grundgev fyri tínum svari.

255 Vár Guð er føst og haldgóð borg

1. Vár Guð er føst og haldgóð borg,
har vit væl vardir standa,
hann hjálp vár var í hvørji sorg,
vár vernd í hvørjum vanda;
nú fjandin vreiður er
og fram við grimdum fer,
hann roynir svikaráð
og okkum herjar á,
ei finst á jørð hans líki.

2. Vár egin kraft so lítil er,
at brátt berst tap í hendi;
men ein í stríð við okkum fer,
sum Guð við veldi sendi.
Tað Harrin Jesus er,
ið ein av øllum ber,
ei annar Guð er til,
hann okkum hjálpa vil,
hann víst man valin halda.

3. Um djevlum uddi verøld í,
sum okkum vildu týna,
vit óttast ongan vanda, tí
teir sjálvir skulu dvína;
um myrkurs púki vil
alt illmegn leggja til,
hann einki vinna man,
tí áður dóm fekk hann,
eitt orð kann brátt hann fella.

4. Hvør fíggindi skal ótøkk fá,
hvørt orð várs Guðs skal standa,
tí Harrin gongur okkum hjá
við hjálp og halgum anda.
Og taka teir várt lív,
fæ, frælsi, barn og vív,
í Guðs frið, hvussu fer,
tað teimum gagn ei ger,
Guðs ríki okkum ognast!

46. Sálmur , Martin Luther 1529. J. Dahl.
Lag: Sl. 354.

Um sálmin

Í byrjanini av 1500 talinum var latín kirkjumálið. Alt uttan prædikan var á látíni. Sjálvt um vanlig fólk ikki skiltu eitt orð av tí, sum varð sagt, vóru børnini doypt á latíni. Presturin las á latíni úr Bíbliuni, og altargongdin fór eisini fram á latíni. Sálmarnir vóru somuleiðis á latíni, og bara kirkjukórið sang. Tað vanliga kirkjufólkið slapp ikki at syngja við. Har sótu tey so og fingu ikki nógv við, av tí íð hendi í kirkjuni.

Um nýggjársleitið í 1524 skrivaði týski presturin Martin Luther (1483-1546) til ein vinmann, at hann ætlaði at gera týskar sálmar til fólkið, fyri at Guðs orð kundi vera í fólkinum við hjálp frá sanginum. Luther royndi at finna yrkjarar, men striltið gekst, tí antin dugdu teir ikki, ella tordu teir ikki. Tað var heldur ikki gamansleikur at seta seg upp móti teirri katólsku kirkjuni og pávanum, sum segði, at latín var kirkjumálið. Luther fór síðani sjálvur at skriva sálmar. Fyrsti sálmurin, Luther skrivaði á týskum, var *Vár Guð er føst og haldgóð borg*, og er hetta ein umyrking av 46. Sálmi í Gamla Testamenti.

Sálmurin gjørdist eitt slag av mótmælissálmi hjá viðhaldsfólkið Luthers, sum vórðu kallað lutheranarar ella protestantar. Tað hendi fleiri ferðir, at kirkjufólkið skar í at syngja undir prædikuni og køvdi teir katólsku prestarnar, sum vóru ósamdir við Luther.

Uppgávur

Vandi var fyri uppreistri. Luther mótmælti læruni og tí mátanum kristindómurin varð útinntur í tí katólsku kirkjuni, sum hann segði, hvørki tænti fólkinum ella Várharra. Hetta var vandafult, tí Luther kundi verða lýstur í bann av pávanum. At verða lýstur í bann er at verða útihýstur úr kirkjuni, og eftir katólskari hugsan eisini útihýstur úr himmalinum. Luther varð bannlýstur í 1520, og í 1521 var hann eisini gjørdur útlagin. Tað var vælvild frá Fríðrikki hinum Vísa, at Luther kom undan við lívinum, tí fúrstin flutti Luther burtur og goymdi hann á sínari borg.

1. Syngið sálmin og leggið til merkis, hví hann er eitt mótmæli.
2. Samtalið um:
    a) 1. ørindi: Hvør er fjandin?
    b) 2. ørindi: Men ein í stríð við okkum fer, hvør er hann?
    c) 3. ørindi: Hvørjir eru djevlarnir?
    d) Hvør er púkin?
    e) Hví fær tað illa ikki valdið?
    f) Greið frá 4. ørindi.

3. Siðaskiftið
    a) Nær fór skiðaskiftið fram í Føroyum?
    b) Hví kom siðaskiftið?
    c) Hvussu fór siðaskiftið fram?
    d) Hvat gjørdist kirkjumálið í Føroyum við skiðaskiftinum, og hví bleiv tað á hendan hátt?
    e) Nær fekk kirkjumálið ta støðu, tað hevur í dag?

318 Um tú vilt gleði vinna

1. Um tú vilt gleði vinna,
søk ei til hægsta sal!
Nei, eydnan er at finna,
har grannar semjast væl,
har kærleiki man ráða,
har blídni er við borð,
har mildar tungur sáa
tey mjúku troystarorð.

2. Tey, sum Guðs vilja gera,
og elska fólk og land,
tey signing við sær bera,
sum sløkkir hatskan brand.
Tey lýsa gjøgnum strevið,
tey bjarga lond úr neyð,
tey sigra víst. Guð gevi,
vit teljast millum tey.

Mikkjal á Ryggi.
Lag: Sl. 347.

Um sálmin

Skaldið Mikkjal Dánjalson á Ryggi (1879-1956) yrkir her um gleðina. Vit vilja øll fegin hava lut í gleðini og vilja gera nógv fyri at gerast glað. Skaldið førir fram, at tað er sera einfalt at finna gleðina, tí hon er ikki einans at finna, har alt er stórbart og fínt, nei, gleðin er at finna í tí dagliga millum okkara vinir, grannar og næstrafólk.

Skaldið mælir til, at vit fylgja Jesu orðum um at elska okkara næsta, bera yvir og í staðin fyri at ilskast koma við tí góða orðinum og fyrigeva, tí *Kærleikin fjalir fjøld av syndum* (1. Pæt. 4,8). Kærleikin fyrigevur og vil ongum ilt, tí vilja tey, sum lýða Jesu kærleiksboð og sýna tolsemi, eisini vera við at fáa frið í lag.

Sálmurin endar við eini bøn um, at vit mugu teljast millum tey, sum søkja hesa gleði og tessvegna eru til signingar.

Uppgávur:

1. Í sálminum verða grannarnir nevndir. Grannar kunnu vera so mangt, hvat fær orðið grannar teg at hugsa um?
2. Heldur tú, at tú hevur nakra skyldu móti tínum grannum? Grundgev títt svar.
3. Hevur tú nakrantíð hoyrt um grannaklandur?
4. Hví heldur tú, at grannar fara at klandrast?
5. Hevur tú nakað uppskot til, hvussu grannaklandur kann verða loyst?

Aðrar uppgávur

Happing kenna vit øll til. Við hvørt førir klandur til happing.

1. Kennir tú nakað til happing?
2. Ert tú nakrantíð happað ella happaður?
3. Hevur tú verið við til at happa, um ja so hví?
4. Hvussu heldur tú, at happing kann steðgast?
5. Tosið saman í flokkinum, um hví happing fer fram?

Aðrar uppgávur:

Lesið søguna Bara hesa ferð, eftir Halldóru Dam ella Krubbuspælið í 7. fl., eftir Minu Reinert. Søgurnar standa í bókini Mín jólabók 2007.

a) Samtalið um søguna.

b) Halda tit, at tað sama kundi hent tykkum?

Sálmar til fólkaskúlan, miðdeild © Føroya Skúlabókagrunnur 2008

327 Hin signaða dag vit síggja fró

1.Hin signaða dag vit síggja fró
úr havinum upp at stíga,
hann hækkast á himli, og hvør tjóð
seg gleðir við ljósið blíða;
tað kennist á okkum, ljósins børn,
at náttin man burtur glíða.

2. Hin sælasta stund, hin miðja nátt,
tá Krist seg í heim læt bera,
tá klárnaði upp í eystri hátt,
so gylt mundi glæman vera;
tá ljósið upp rann, sum jarðarknøtt
skal glitrandi bjartan gera.

3. Um livandi varð hvør urt í verð
og kundi við tungum røða,
tær orkaðu ei Guðs náðar gerð
nóg virðisligt út at kvøða,
tí ævigt nú skínur lívsins ljós,
sum sjúkastu sál kann grøða.

4. So takka vit Guði hjartans glað
sum fuglur á ljósum degi,
tí hann okkum gav tann gylta dag
og vakti upp lív við megi,
hin signaða dag í Jesu navn,
sum gevur Guðs børnum gleði.

5. Nú signaður dagur góður líð
við geislandi sólarspæli,
hvør løta til Harrans heiður glíð
sum blíðmælta á í dali,
og songur til tøkk við frøi stíg
upp móti Guðs ljósa sali.

6. Sum gull er hin væna morguntíð,
tá dagur av deyða rísur;
enn fjálgari bros á kvøldi blíð
hin rodnandi glæman vísir,
hvør følnaða kinn tá dæmi fær,
og gleði úr eygum lýsir.

7. So fara vit til várt fedraheim,
har dagur ei legst í dvala,
at búgva í borg við sælum gleim',
í glitrandi høllum spæla,
í frøi og frið um alla tíð
við vinir í ljósi tala.

Donsk miðaldarvísa.
Grundtvig 1826.
Mikkjal á Ryggi.
Lag: Sl. 145.

Um sálmin

Í 1826 skuldi danska kirkjan hátíðarhalda, at 1000 ár vóru liðin síðan kristniboðanina í Danmark. Í hesum sambandi skrivaði presturin Nikolaj Frederik Severin Grundtvig (1783-1872) nakrar sálmar, sum skuldu syngjast undir hátíðargudstænastuni í Vor Frelsers Kirke í Keypmannahavn hvítusunnudag. Ein av sálmunum var *Hin signaða dag*, sum var ein umyrking av einari dagvísu úr miðøld.

Men bispi og øðrum, sum leingi høvdu havt eyguni við Grundtvig, tí teimum dámdi ikki tað, hann skrivaði, dámdi heldur ikki teir nýggju sálmarnar, Grundtvig skrivaði til 1000 ára haldið. Teir hildu ikki, at sálmarnir hóskaðu til gudstænastu, tí innihaldið

var ikki nóg gott, og Grundtvig fekk forboð fyri at skriva. Grundtvig gjørdist í øðini og segði seg frá sum prestur beint fyri hátíðarhaldið.

Sjálvt um sálmurin ikki varð sungin undir gudstænastuni, so gjørdist hann kortini ein av teimum nógv sungnu sálmunum gjøgnum tíðirnar. Grundtvig sipar til ”dagin” sum mynd upp á mannalívið úr vøggu í grøv. Hann samanber mannalívið við ein dag, sum gongur móti kvøldi – deyðanum, men Grundtvig steðgar ikki her. Hann vísir samstundis á ta kristnu vónina, tá ið lívsdagurin endar *So Fara vit til várt fedraheim, har dagur ei legst í dvala…*

Hetta er ikki einans ein sálmur um dagin frá sólarrisi til sólsetur, men eisini ein hátíðarsálmur *Hin sælasta stund hin miðja nátt, tá Krist seg í heim læt føða* vísir til jólini. *Tí hann okkum gav hin gylta dag, og vakti upp lív við megi,* vísir til páskirnar. Og í upprunatekstinum sipar hann í 5. ørindi til hvítusunnuna og til túsundárahaldið við orðunum *Nu sagtelig skrid vor højtidsdag,* á føroyskum *Nú signaður dagur góður lið*.

Ljósið

Grundtvig kallar menniskjuni *ljósins børn* í sálminum og meinar við hesum, at vit eru Guðs børn. Við sólini gevur Guð okkum eina gávu. Sólin breiðir ljós, hita og tryggleika. Alt tað, sum í náttarmyrkrinum ræddi okkum, sýnist øðrvísi í dagsljósi. Tá ið Grundtvig kallar menniskjuni ljósins børn, merkir tað eisini, at vit eiga at breiða ljós og hita rundan um okkum. Vit skulu við okkara næstakærleika gleða okkara medmenniskju, so at tey kenna seg væl saman við okkum og á tann hátt tendra ljós í lívinum hvør hjá øðrum.

Uppgávur:

1. Grundtvig skrivaði sálmin um dagin, men dagurin hevur tveir týdningar. Finn dømi um hesar týdningarnar í sálminum?
2. Samtalið um, hvussu dagurin líkist mannalívinum
3. Samtalið um ljós og myrkur. Hvønn týdning hava hesi bæði fyri okkum?
4. Um tað ber til, roynið so at práta saman í myrkri. Er nakar munur á at tala saman í myrkri og í ljósi?

470 Kom, friður av himni, í hjørtuni inn

1. Kom, friður av himni, í hjørtuni inn,
Guðs dýrd til tey smáu á foldum,
og grøð tey sjúku í sál og í sinn',
sum særdust av syndanna voldum.

2. Kom, kærleikans andi, sum vársólin blíð,
ið kveikir upp lívið á vali,
og birt í barminum bjartari tíð,
sum sýnist í verki og talu.

3. Kom, rættlætis andi, og leið okkum so,
at trúgvin í hjartanum brennur,
og flyt úr barmi tey trúnaðarboð,
ið faðirin fagnar og kennir.

4. Tá tagna tey tár, sum í sorgtungu stund
so nívandi boygdu til jarðar,
og sálin søkir hin friðsæla fund,
har faðirin barninum svarar.

Louis Zachariasen.
Lag: Sl. 190.

> *Men talsmaðurin, heilagi andin, sum faðirin skal senda í mínum navni, hann skal læra tykkum alt og minna tykkum á alt, sum eg havi sagt tykkum.*
>
> *Frið lati eg eftir hjá tykkum, mín frið gevi eg tykkum; eg gevi tykkum ikki eins og heimurin gevur. Hjarta tykkara óttist ikki og ræðist ikki! Jóh. 14,26-27*

Um sálmin

Louis Zachariasen (1890-1960) yrkti sálmin. Her verður á ein sera einfaldan hátt sagt frá Guðs friði. Sálmurin er samstundis ein innilig bøn um, at Guðs Andi má koma til jarðar og gera sín góða gerning í menniskjunum. Andin verður nevndur við fleiri nøvnum, sum eisini sipa til andans gerning, og hann virkar m.a. frið, kærleika, rættlæti og troyst. Tá ið andin fær loyvi at gera sín góða gerning, lívgar hann. Tað, sum fyrr var tungt og nívandi, gerst lættari at bera, og andin leiðir barnið til faðirin.

Uppgávur:

1. Hvat sigur Jesus um sín frið í Jóh. 14.26-27.
2. Guðs andi hevur nógv nøvn, sum ofta sipa til andans verk.
   a) Hvørji nøvn finnur tú í sálminum?
   b) Kennir tú onnur nøvn fyri andan?
3. Hvat fert tú at hugsa um, tá ið tú sigur orðið frið, skriva lyklaorð.
4. Samanber tíni orð við tey hjá hinum í flokkinum?

Aðrar uppgávur:

1. Dúgvan verður ofta nýtt sum tekin upp á andan, les Matt.3,13-17. Hvaðani stavar hesin tankin?
2. Tað er eisini rættiliga vanligt at síggja dúgvur sum prýði á leiðum. Hví seta fólk dúgvur í kirkjugarðin?
3. Eisini verðsligir felagsskapir nýta dúgvuna sum búmerki.
   a) Samtalið um ein ella fleiri felagsskapir, sum nýta dúgvur sum búmerki
   b) Hvørjum arbeiða hesir felagsskapirnir fyri?

Jesu dópur

Tá kemur Jesus úr Galileu til Jórdans til Jóhannesar at verða doyptur av honum. Men Jóhannes vildi forða honum og segði: "Mær kundi gjørst neyðugt at verða doyptur av tær, og so kemur tú til mín!" Men Jesus svaraði og segði við hann: "Lat tær nú eftirlíka, tí at soleiðis sømir tað okkum at gera alt tað, ið rætt er." Tá eftirlíkaði hann honum. Men tá ið Jesus var doyptur, kom hann við tað sama upp úr vatninum aftur; og sí, himmalin opnaðist fyri honum, og hann sá Guðs anda fara niður sum eina dúgvu og koma yvir hann. Og sí, ein rødd kom av himli, ið segði: "Hesin er sonur mín, hin elskaði, sum eg havi góðan tokka til."

Matt. 3,13-17

522 Guð, ger meg til eitt lítið ljós

1. Guð, ger meg til eitt lítið ljós
um lívsins stutta skeið;
sum hjálpir teim á rætta kós,
ið viltust burt av leið.

2. Guð, ger meg til eitt blomstur blítt,
sum brosar øllum mót,
sum tekur bæði kalt og lýtt
við tol á síni rót.

3. Guð, ger meg til eitt signað lag,
sum lívgar hug og sál,
sum birtir sól og summardag
og doyvir storm og bál.

4. Guð, ger meg til ein sterkan stav
at styðja veikar væl,
hjálp, at tað ljós, sum tú mær gav,
eg nýti, sum eg skal.

5. Guð, ger mær lyndi reint og ljóst
við halgum sálmalag
at bera troyst í stúrin bróst
og gera syrgin glað.

Matthías Jochumsson. Mikkjal á Ryggi.
Lag: Sl. 92.

Um sálmin

Matthías Jochumsson (1834-1920) var prestur og skald og eitt av mætastu skaldum Íslands í síni samtíð. Hann verður ofta nevndur tjóðskald Íslands. Hann yrkti m.a. sálmin *O, Guð vors lands*, sum seinni gjørdist tjóðsangur í Íslandi.

Hesin sálmurin er ein sera einfald yrking, sum eisini kann lesast sum ein bøn. Ein bøn um megi til at liva lívið í kærleika til Guð og næstan.

Uppgávur:

1. Hvussu er huglagið í sálminum?
2. Hvussu meinar skaldið, at ein kristin er, ella rættari eigur at royna at vera?
3. Myndskrýð sálmin, antin eitt ávíst ørindi, ella ger sálmin til eina myndarøð?

Aðrar uppgávur:

1. Samtalið í flokkinum um, hvat gleði er.
2. Hvat gleðir teg (ger ein lista).
3. Gerið ein felags lista fyri allan flokkin.
4. Samanber tín lista við flokslistan. Hvussu hóska teir saman?

545 Guð, tú sum ljósið lætst skína so bjart

1. Guð, tú sum ljósið lætst skína so bjart,
sjálvur ert ljóskeldan reina;
aldri seg nærkar tær myrkrið so svart,
sólin har vald hevur eina.

2. Skýggini dimmu nú hvørva so brátt,
dagurin bjarti nú rísur;
stjørnur, sum glógvaðu myrklongu nátt,
blikna, nú sólbirtan lýsir.

3. Frísk vit frá náttarrógv glað eru nú
tøkk tær við songi at veita;
náttina starblindu burt beindi tú,
dagsljósið aftur man leita.

4. Halt allar freistingar okkum ífrá
og alt, sum tungliga bagir!
Við tínum kærleika ver okkum hjá,
halgi og algóði faðir!

5. Vreiðini steðga, tí hon veldur neyð!
Gleði og frið gev í sinni!
Fátæka manni gev dagliga breyð!
Leið tú oss úti og inni.

6. Styrk tú og styðja oss, fast vit tá stá,
stríða og sigra í stríðum!
Frelsari vár, tú skalt æruna fá
nú og í ævigum tíðum.

C.J. Brandt 1874. Símun av Skarði.
Lag: Sl. 110.

Um sálmin

Símun av Skarði (1872-1942) týddi sálmin eftir Carl Joakim Brandt (1817-1889). Sálmurin stóð í ”Sange for den kristelige folkeskole” frá 1874. Í hesum morgunsálminum lovsyngur skaldið Guði, sum gav ljósið og morgunin. Guð sjálvur er ljóskeldan reina, og tá ið hann er í nánd, kann einki myrkur vera. Við náttini hvørvur alt tað myrka, og fólk vakna fró og fús aftur til ein nýggjan dag. Sálmurin er eisini ein bøn um, at Guð má vera við okkum allan dagin, sum kemur, syrgja fyri dagligum breyði og fyri, at vit ikki mega falla í freistingar og gera nakað ilt.

Uppgávur:

1. Hvat verður Guð sammettur við í sálminum?
2. Hvørjar bønir úr faðirvár finnur tú í sálminum?
3. Les sálmin og finn øll tey positivu orðini í sálminum, sum boða frá gleði?

Aðrar uppgávur:

Skriva eina yrking um tín egna morgun ella avmynda eitt ørindi í sálminum.



Føroya Skúlabókagrunnur 2008